# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føroya besti bilmekanikari



Føroya Shell ynskir at finna Føroya besta bilmekanikara. Tiltakið verður á Tekniska Skúla í Tórshavn leygardagin 10. mai – frá kl. 10 og úteftir.

Bæði sveinar og lærlingar kunnu meldað seg til. Kappast verður á trimum økjum: at umvæla, at finna feilir og síðan spurningar.

Kappingin verður skipað soleiðis, at allir luttakarar verða líka stillaðir. Dómarar verða lærarar á bildeildini á Tekniska Skúla í Havn. Heiðursmerki verða handað trimum teimum bestu.

Føroya Besti Bilmekanikari vinnur eina vikuskiftiferð fyri tvey á Hotel Hilton í Keypmannahavn. Onnur spennandi tiltøk verða á Tekniska Skúla henda sama dagin

Tilmelding til kappingina kann gerast á telduposti shell@shell.fo, ella við at ringja til 347412.

## Andlát og jarðarferðir

**Ove Magnussusen**, ættaður úr Sørvági, búsitandi í Saltangará, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 90 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum leygardagin klokkan 16 í Glyvra kirkju. Jarðarferðin verður sunnudagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Ova kunnu lata Glyvra kirkju eina peningagávu.

**Dávur Samuelsen** andaðist á landssjúkrahúsinum mikudagin, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin úr Havnar kirkju kl.15.

**Dagurin**
**12. apríl. Julius**, deyður í 352. Til minnis um pávan Julius I. Rómverskt ættarnavn.

**13. apríl. Jústinus**, deyður umleið ár 165. Heiðin maður í Sámáriu; varð upplærdur í grikskari heimspeki og fekk navnið heimspekingurin. Gjørdist kristin og varð tí tikin av døgum í Róm. Navnið merkir hin rættvísi.

**14. apríl. Summarmáli**. Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið hendan dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi døgsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis verður várið. Dagurin eitur annras Tiburtius. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið 225.

## 9. flokkur í starvsvenjing

**STARVSVENJING**
*Orð&myndir: Ragnar Borðoy*

Hesar seinastu tvær vikurnar hava næmingar í 9. flokki á Felagsskúlanum á Oyrarbakka verið í starvsvenjing ymsastaðni kring landið.

Praktikanturin á Miðlahúsinum, Ragnar Borðoy hevur hitt tveir av floksfelagum sínum – Dan og Hannes - sum báðir eru í starvsvenjing í SMS í Havn.



*Hannes Debes er í Expert*

### Tað sama sum hinar dagarnar

**Navn:** Hannes Debes
**Flokkur:** 9.A
**Bygd:** Norðskála
**Praktikantpláss:** Expert

**1.** *Er nøkur serlig orsøk til at tú valdi júst hetta arbeiðsplássið?*
- Mær dámar væl elektrisk ting, spøl filmar o.s.fr.

**2.** *Er tað sum tú helt at tað fór at vera?*
- Ja, nøkulunda. Tað er jú eitt arbeiði.

**3.** *Hvat gert tú vanliga?*
- Standi við kassan, fari eftir vørum og hjálpi kundunum

**4.** *Hvat hevur tú gjørt í dag?*
- Eg havi faktisk gjørt tað sama í dag, sum øllum øðrum døgum her á staðnum, staðið við kassan o.s.fr.

**5.** *Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum seinni í lívinum?*
- Ja, men í einum ávísum øki so sum sjónvarp ella bara filmar.



*Dan Andreasen er í Sportmaster*

### Selt nógvar gaggur

**Navn:** Dan Andreasen
**Flokkur:** 9.a
**Bygd:** Eiði
**Praktikkpláss:** Sportmaster

**1.** *Er nøkur serlig orsøk til at tú valdi júst hetta arbeiðsplássið?*
- Mær dámar sera væl ítrótt, so eg helt at tað kundi vera sera skeg at farið og selt ítróttarútgerð.

**2.** *Er arbeiðið, so sum tú helt at tað fór at vera?*
- Nei. Tað er ikki akkurát sum eg helt at tað fór at vera, men tað hevur verið skeg.

**3.** *Hvat gert tú vanliga?*
- Eg hjálp kundum, leggi klæðir og vørur uppá pláss.

**4.** *Hvat hevur tú gjørt í dag?*
- Tað hevur ikki verið nógv at gera í dag, men eg havi selt gaggur og sett vørur uppá pláss.

**5.** *Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum seinni í lívinum?*
- Hettar er kanska ikki akkurát eg, men okkurt líknandi.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

